# Sosialurin

Nr. 38 • fríggjadagur • 23. februar 2001 • 75. árgangur • Kr. 10,00

www.sosialurin.fo









Nýggjur rækjutrolari:

## Skal troyta ónýttar fiskidagar

síða 9



Nicoleta beinbrotin:

## Verður tungt hjá VÍF

Ítróttur,síða 24-26



## Væntar harðar samráðingar

síða 3



# Samgongan um at skrædna

**Løgdeildin í Tinganesi er liðug at kanna embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø. Tað skilst, at niðurstøðan av kanningini og ósemjan um fólkaatkvøðuna skapa so mikið av rumbuli í Tinganesi, at samgongan er í stórum vanda**

ÓSEMJA

*John Johannessen*

Stóra ósemjan millum teir tríggjar samgonguflokkarnar um ætlaðu fólkaatkvøðuna hevur sett samgonguna í vanda. Eingin av flokkunum vil geva seg.

Oman á tað heila er Løgdeildin í Tinganesi komin til eina niðurstøðu í kanningini av embætisførsluni hjá Helenu Dam á Neystabø, sum er rættuliga tyngjandi, skilir Sosialurin úr Tinganesi.

Sosialurin hevur roynt at fáa innlit í niðurstøðuna. Men boðini úr Tinganesi eru, at tað ikki ber til at útflýggja niðurstøðuna enn. Umsitingin hevur sambært lógini um innlit í fyrisitingina loyvi at bíða 14 dagar við at útflýggja skjøl.

Tá vit fyrrapartin í gjár tosaðu við Helenu Dam á Neystabø vísti hon ikki aftur, at talan var um eina tyngjandi niðurstøðu.

– Tað kann vera, at tit hava rætt, men eg havi onga viðmerking enn, segði Helena Dam á Neystabø.

Løgmaður vildi heldur ikki gera viðmerkingar til málið.

– Vit viðgera hetta í løtuni, og tit skulu nokk frætta, tá nakað er at frætta, segði løgmaður.

Løgmaður sat á fundi meginpartin av fyrrapartinum í gjár um málið. Sosialurin skilir, at tað kann koma upp á tal at taka landsstýrissessin frá Helenu Dam á Neystabø.

Missir Helena Dam á Neystabø landsstýrissessin, er vandi fyri, at Sjálvstýrisflokkurin tekur seg úr samgonguni, og so hevur hon mist meirilutan. Mest sannlíkt er kortini, at Helena Dam á Neystabø sjálv sigur seg úr landsstýrissessinum.


TELDUTILBOÐ



Duron 800MHz, 128MB RAM, 15.3GB harðdisk, 17" litskerm, Geforce 2mx skermkort 32MB, 40x CD-ROM, 10x DVD-ROM, 56K modem, ljóðkort, hátalarar, knappaborð, mús, Windows ME.

+ Litprintara: Epson Stylus Color 480

Tilboð fyri Teldu og Litprintara

kr. 13.450,-

SpF Teldu Tænastan

Staravegur 5 - Telefon 317620 - Heimasíða www.tt.fo

i

Sosialurin

Grannskoðan • Ráðgeving
Bókhald • Skattamál
- og annað

Sosialurin - 311820

RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of

Á GLAÐSHEYGGI - BOX 30
FO-110 TÓRSHAVN - P/F NR. 267
TEL. (+298) 311017 - FAX (+298 311018)

e-mail: rasmussen@rasmussen.fo
Heimasíða: www.rasmussen.fo

Ring bíligari við GACB

DANMARK
uml. 1,40 kr./min.

Telefar
Tel. 21 33 33 • Tel. 33 33 33
fax 001 208 485 6388
tf@telefar.com

Sp/f VVS-HORNIÐ
Lágpríshandil

Alt innan hitaverk & sanitet so sum:

- Stoypijarnsketil
- Sanitet
- Kranar
- Baðirúmsmøblar

Støkk inn á gólvið ella ring

Landavegur 2 - 100 Tórshavn
Tel. 318023 - Fax 310963

Sosialurin - 311820